gult cyan magenta svart



## Gólvuppboðssølan

**Níggju bátar seldu góð níggju tons um gólvsøluna hjá Fiskamarknaðinum týsdagin. Sum tað framgongur av yvirlitinum niðanfyri, so átti línubáturin, Ægir, størsta partin av søluni**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 9 | JÓGVAN NORÐI | LÍNA | 39 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 8.157 |
| VA 132 | LÍV | SNELLA | 97 |
| VA 164 | NIKLÁI | SNELLA | 177 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 104 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 445 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 67 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 115 |
| XV 45 | VAÐHORN SEAFOOD P/F | BOTNTROL | 60 |

**Sølan hjá bátunum sundurliðaði seg soleiðis:**

| VøruNavn | Kilo |
|---|---|
| LONGA 4 | 15 |
| STEINBÍTUR | 23 |
| HAVTASKA 0 | 68 |
| TOSKUR 1 | 23 |
| TOSKUR 2 | 412 |
| TOSKUR 3 | 2.622 |
| TOSKUR 4 | 3.969 |
| TOSKUR 5 | 566 |
| HÝSA 2 | 211 |
| HÝSA 3 | 625 |
| HÝSA 4 | 17 |
| BROSMA 0 | 21 |
| LONGA 0 | 3 |
| TOSKAROGN | 419 |
| SIL | 267 |

FISKIVINNUTÍÐINDI

# Norðborg tikin í Barentshavinum



*Norðborg liggur nú inni í Vadsø í Norðurnoregi*

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Skiparin á Norðborg, Kristian Martin Rasmussen varð í gjár avhoyrdur hjá løgregluni Vadsø.

Um middagsleitið týsdagin komu menn frá norska vakrarskipinum "Stålbas" umborð á Norðborg, sum er á lodnuveiðu í Barentshavinum. Norðborg royndi á gráu leiðini einar 55 fjórðingar norður úr Vardø.

Norska blaðið Nordlys skrivar, at Norðborg var ikki undir illgruna, tá menn fóru umborð, men eftir at hava gjøgnumgi pappírini varð skiparin biðin um at fylgja við inn til Vadsø.

Norðborg er skuldsett fyri ikki at hava boðað frá, tá teir fóru fram við einum ávísum punkti og fyri ikki at hava sent út fyldisveinasignal, sum kann siga myndugleikunum, hvar skipið er statt.

Palli Ziskason, frá reiðarínum hjá Norðborg sigur, at teir ikki rættuliga skilja hví onki signal er sent til fyldisveinin.

– Vanlig mannagongd er tann, at radiosendarin sendir eitt signal einaferð um tíman og er okkurt galið við sendaranum, so sigur Vaktar og Bjargingartænastan frá. Tað er so ikki hent í hesum førinum. Hendan skipanin ger, at myndugleikarnir til eina og hvørja tíð kunnu siga, hvar skipið er statt og tað skuldi, samstundis sum teir hava eftirlit við okkum, eisini bøtt um trygdina, sigur Palli Ziskason.

Enn er skipanin við fylgisveinaeftirlitið ikki galdandi fyri føroysk fiskiskip undir Føroyum. Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskimálum arbeiðir við eini ætlan, har øll føroysk fiskiskip skulu hava hesa tøkni umborð.

Jørgen Niclasen leggur á dent á, at hendan skipan verður ikki sett í verk fyri at elta skip, heldur fyri at økja um trygdnina og vísa at skip halda nógv betri reglugerðirnar enn vanliga verður hildið.

## Sparikassin krevur stóra trygd frá vinnulívinum

Sparikassin virkar í dag sum ein vanligur banki og hann krevur stóra trygd, gongur hann við í eina verkætlan.

– Vit hava ikki nakað fast mark fyri hvussu stórur eginfíggingin skal verða, um vit játta at fíggja eina verkætlan. Tað velst nógv um hvussu nógv vit vága. Í einstøkur førum krevja vit upp um 40 prosent í øðrum føri eru vit lægri. Støðið í dag liggur millum 20-40 prosent, sigur Marner Jakobsen.

# Sparikassin fíggjar helvtina av føroysku alivinnuni

Sparikassin er ikki longur bara ein sparikassi, hann er nú eisini ein banki og hann er rættuliga farin úr í vinnulívið.

– Vit fíggja umleið helvtina av føroysku alivinnuni og vit eru eisini við í vinnulívinum, serliga, tá tað snýr seg um fiskivinnu, sigur Marner Jacobsen, stjóri í Sparikassanum við Sosialin.

Sparikassin hevur júst almannakunngjørt rokniskapin fyri í fjør. Roknískapurin verður endaliga góðkendur á aðalfundinum hjá Føroya Sparikassa, sum verður hildin 30. mars.



*Marner Jacobsen, sparikassastjóri*

Sparikassin hevur eftir skatt í ár ein vinning upp á 50 milliónir krónur. Netto rentuinntøkurnar øktust við 12,2 prosentum upp til 189,1 millión krónur. Gjaldføri Sparikassans er nú beint undir eina milliard.

– Okkara leiklutur í vinnulívinum er blandaður, men størsra økingin er í alivinnuni. Annars fíggja vit fiskivinnu, handilsvinnu, tænastuvinnu og so víðari, sigur Marner Jacobsen

Vinnulívslánini eru í fjør økt við 12 prosentum, meðan lánini til privat er økt við fimm prosentum.

– Privatkundin er framvegis okkara álit, men eftirhondini, so eru vinnulívslánini vorðin ein stórur partur av okkara virksemi, sigur hann.

## 4,800 tons av alifiski tikin í ár

Í næstseinastu viku vóru 810 tons tikin í føroyskum alibrúkum og hesi vóru kruvd á teimum 10 sláturstøðunum í landinum.

Eisini vóru 807 tons av sílum tikin. Higartil í ár eru tilsamans 4,833 tons av aldum fiski tikir í Føroyum, harav 807 tons av sílum.

Átta sláturvirkir tóku laks í næstseinstu viku og tey hava kruvt 183215 laksar. Miðalvektin var 4,43 kilo.

# Vestlax víðkar á Hellunum

Vestlax og harvið eisini PanFish ger í løtuni útbyggingar á smoltstøðini við Laksá í Oyndarfirði. Hendans støðin kann í dag virka umleiðs tvær milliónir smolt árliga og ætlanin er at økja hetta til fimm milliónir árliga

Ein nýggj stór høll verður bygd í løtuni og hendan skal tryggja Vestlaks smolt í framtíðini. Panfish er størsti útlendski eigarin í Vestlaks samtakinum. Vestlaks er í dag størsta alifyritøka í landinum og hon veksur skjótt.

**je**



# – Tú skalt duga at meta um litirnar

**Føroyavitjanin hjá Olaf Berg Nielsen í 1978 gjørdist nógv longri enn æltað, og seinastu 15 árini hevur hann havt egna prentsmiðju í Klaksvík**

PRENTARI
*Eyðun Klakstein*

Tá danin Olaf Berg Nielsen kom til Føroya í 1978 skuldi hann bara verða her í tvey ár Men Olaf býr framvegis í Føroyum, og seinastu 15 árini hevur hann havt egna prentsmiðju og lýsingavirki í Klaksvík.

Olaf kom til Føroya í sambandi við tilknýti sítt til Jehova Vitni.

– Vit trivust so væl í Føroyum, at vit vórðu verandi her, sigur Olaf.



*Olaf Berg Nielsen hevur starvast í Føroyum síðani 1978, men ætlanin var, at danski prentarin bara skuldi verða í Føroyum í tvey ár, tá hann kom higar*

### Serliga norðoyingar

Olaf Berg Nielsen hevði útbúgving sum typografiskur prentari, tá hann kom til Føroya, og hann starvaðist í seks og eitt hálvt ár á Norðlýsinum.

Síðani var hann í hálvtannað ár á 14. September, áðrenn hann í 1986 fór undir sítt egna virki.

Olaf Berg Nielsen hevur framvegis prentsmiðjuna og lýsingarstovuna sum kallast Norðoya Reklama, og hann hevur ovmikið at gera í hesum døgum.

– Mínir kundar eru serliga norðoyingar, men tað eru eisini aðrir kring landið, sigur Olaf.

### Litir og skriftir

Olaf Berg Nielsen hevur drúgvar royndir sum prentari, og hann hevur eisini fylgt við í fakinum, síðani hann fekk útbúgving sína.

Í dag prentar hann alskyns prentlutir fyri fólk og fyritøkur.

– Tað er týdningarmikið, at ein prentari dugir at meta um litirnar, og hann skal eisini duga at brúka skriftir skilagott, heldur Olaf.

Norðoya Reklama liggur í Nólsoyar Pálsgøtu í Klaksvík.

# Rós til Óla Poulsen

**Írski sangarin, Johnny Logan, hevur gjørt nýggja fløgu, sum føroyski Óli Poulsen hevur framleitt. Logan rósar Óla Poulsen fyri avrikið**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Mánadagin kom ein nýggj útgáva av Grand Prix hittinum »Hold me Now« frá 1987 á gøtuna.

Tað er framvegis kendi írski sangarin, Johnny Logan, sum syngur sangin, men hesaferð er tað føroyski Óli Poulsen, sum hevur lagt heimshittið til rættis.

Johnny Logan hevur verið í Keypmannahavn og gjørt upptøkurnar til nýggju fløguna hjá sær, og hendan steðgin er hann væl nøgdur við.

– Eg havi funnið meg sjálvan í upptøkuhølunum í Kepmannahavn, sigur Johnny Logan við danska blaðið BT.



*Óli Poulsen hevur lagt til rættis nýggja útgávu av kenda sanginum »Hold me now« hjá heimskenda írska sangaranum, Johnny Logan. Írski sangarin er sera væl nøgdur við avrikið hjá Óla*

### Í óføri

Umframt eina duett við kendu donsku sjónvarpskvinnuna Natasjha Crone, syngur Johnny Logan fleiri gamlar sangir á nýggju fløguni.

Og so er tað sjálvandi kendasti sangur hansara, »Hold me now«, sum hann vann altjóða Grand Prix kappingina við í 1987. Hetta var aðru ferð, at Logan vann hesa kapping.

Fyrru ferð var í 1980 við sanginum »What´s another year«, og eftir hendan sigurin fór lív hansara rættiliga av sporinum.

Hann kom í fíggjarligt og persónligt óføri, og tað var meðan hann var ringast fyri, at hann skrivaði »Hold me now«.

### Betri enn tann fyrra

Avgerandi vendin í lívi hansara kom, tá hann slapp við í írsku Grand Prix kappingina. Hesa kappingina vann hann, og tað gjørdi hann eisini, tá altjóða finalan var.

Síðani hevur Johnny Logan vunnið nógvar pengar, og hann er væl fyri bæði fíggjarliga og persónliga í dag.

Nú roynir hann seg aftur við eini útgávu, og »Hold me now« er eitt av løgunum.

– Mær dámdi ómetaliga væl hendan sangin, men eg sang hann so oftani, at eg misti hugin at syngja hann. Men nú hevur Óli Poulsen givið honum eitt meiri soulmerkt ljóð, og tað var í grundini soleiðis, at eg skrivaði sangin uppruna-liga, sigur Johnny Logan við BT.

– Útgávan hjá Óla er nógv betri enn tann fyrsta útgávan, sum seldi fleiri enn seks milliónir eintøk, staðfestir írski sangarin.

## Kapping um høvd

Í dag er seinasti dagur at gita um, hvussu nógv høvd Trøllabarnið fer at fáa.

Trølla-Pætur fer 10. mars at fáa eitt systkin, og í hesum sambandi verður skipað fyri eini kapping um, hvussu nógv høvd Trølla-barnið fer at fáa.

Børn – ella onnur sum hava hug – kunnu atkvøða á heimasíðuni hjá Trølla-Pæturi, og valið stendur millum 2, 5 og 7 høvd.

Trølla-Pætur sigur, at sera nógv hava roynt at gita, hvussu nóvd høvd Trøllabarnið fær, men enn eru stundir at gita. Seinasta freist er í dag.

Lutakast verður millum tey, sum gita rætt, og vinningurin er eitt gávukort frá BR Leikum.




